# Atli spældi javnt ímóti AGF



Atli Danielsen var sum vant at finna á miðvøllinum hjá Frem, tá ið liðið um vikuskiftið spældi ímóti AGF í donsku 1. deild. AGF stríðist fyri at endurvinna plássið í superliguni, men felagið úr Århus kláraði ikki at syfta Frem. Dysturin endaði vði javnleiki 1-1, eftir at Frem hevði lagt seg á odda. Málið fingu teir beint eftir steðgin. AGF javnaði fáar minuttir seinni, og fleiri mál komu ikki í dystinum. Atli Danielsen spældi við allan dystin.

# Barcelona vann stórsigur

Barcelona gjørdi rættiliga bart í sponsku landskappingini um vikuskiftið. Liðið spældi ímóti Atletico Madrid og vann heili 6-0. Fyrsta málið kom ikki fyrr enn í 39. minutti, men so fekk Barcelona ikki afturhald og skoraði fimm ferðir afturat. Real Madrid vann eisini sín dyst, og høvuðsstaðarliðið liggur á odda í La Liga. Barcelona er beint í hølunum á sínum arvafíggindum

AB – EB/Streymur 1-2 (0-1):

# Tepur sigur til oddaliðið

*AB*

*EB/Streymur*

**EB/Streymur hevði greitt tak á AB allan fyrra hálvleik, og vóru eisini á odda. Men eitt skjótt mál frá AB og ein útvísing av Rafal Kwiecinski gjørdu, at oddaliðið kom undir eitt stórt trýst frá uppflytarunum**

**FÓTBÓLTUR**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Enn eina ferð var AB fyri teprum ósigri. Hesa megnaðu teir væl at trýsta oddaliðið, men einsamalla málið hjá Hendrik Rubeksen var ikki nóg mikið at skjóta nakað stig til heimaliðið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Arnbjørn Hansen, Sorin Anghel og Hans Pauli Samuelsen vóru vandamestu menninir hjá EB/Streymi í fjør, tá teir í landskappingini gjørdu 11 mál hvør. Hesir stóðu allir við síðulinjuna í gjár, og eygleiddu sínar liðfelagar á vøllinum, sum høvdu gott tak á heimaliðnum allan fyrra hálvleik, men komu undir eitt øgiligt trýst móti dystarenda.

Men trýst er ikki tað sama sum málmøguleikar, so hóast pressi var stórt kring brotsteigin hjá EB/Streymi tað seinasta korteri, megnaðu argjamenn ikki at spæla seg til nakran upplagdan málmøguleika.

Hetta var eisini galdandi fyri allan dystin sum heild. AB hevði trupult við at skapa nakrar upplagdar kjansir. Tí royndu teir seg við longum og høgum bóltum niðan í álopið, men hesar tóku Marni Djurhuus og Egil á Bø sær av á besta hátt.

Hinvegin hevði EB/Streymur nakrar naskar royndir, umframt at teir fingu tvey mál. Og tá teir eisini vóru spælstýrandi stóran part av dystinum ber til at staðfesta, at tað var ein uppiborin sigur, teir fingu á Argjum í gjár.

### Kundu avgjørt eftir hálvum tíma

Fyrri hálvleikur var hálvrunnin, tá EB/Streymur fekk hol á. Gert Hansen tveitti innkast inn í brotsteigin, sum Hanus Eliasen leingir við høvdinum. Við handaru stong stóð vælleikandi John Heri Dam, sum við pannuni stýrir bóltin í netið.

Áðrenn hetta hevði Gert Hansen ávarað Danny Rasmussen í málinum, tá hann royndi seg við stútara, sum málverjin tók við eini góðari bjarging. Og stutt eftir máli vóru aftur boð eftir avloysaranum hjá Magnus Poulsen, tá Leif Niclasen stríddi seg til eitt brotsspark. Ronnie Samuelsen tók sær av hesum, men Danny Rasmussen var í fullari longd og vardi fyri skotinum.

Hevði bólturin sitið í netinum, er lætt at hugsa, at so var leyst og liðugt. Uppflytararnir aftanfyri við tveimum málum eftir hálvum tíma móti oddaliðnum, og mótbrekkan hevði verið ógvuliga tung.

Men Danny Rasmussen helt liði sínum inni í dystinum, og beint eftir steðgin var AB brádliga við aftur av álvara, tá Hendrik Rubeksen fekk bóltin í netið.

Ronnie Samuelsen missir bóltin mitt á vøllinum, og Súni Fríði Barbá sendir Bjarna Jørgensen avstað. Kviki vongurin leggur bóltin inn í brotsteigin, har Hendrik Rubeksen tveitir seg fram og beinir bóltin í netið.

Tað gekk tó ikki meiri enn eitt korter, áðrenn EB/Streymur hevði svarað aftur. Teir áttu hornaspark, og bólturin varð sendur fyri føturnar á Bárði Olsen. Hann stóð við brotsteigarmarkið, og sendi bóltin flatt í máli við handaru stong.

Eitt frálíkt mál, sum AB tó kundi vart fyri, við at sett ein mann at dekka Bárð.

### Útvísing trýsti oddaliðið

Tá eitt korter restaði av dystinum, fekk Rafal Kwiecinski sítt næsta gula kort. AB var so smátt byrja at leggja trýst á EB/Streym, og eftir útvísingina av póllendinginum vaks trýstið á René Tórgarð í EB/Streyma-málinum øgiligt.

EB/Streymur royndi bara at verja borg, og argjamenn løgdu alt fyri at fáa eitt stig burtur úr dystinum. Hetta skuldi tó ikki eydnast teimum, tí hóast stórt trýst, var trupult hjá teimum at koma ígjøgnum. Tískil endaði dysturin eisini við einum sigri til EB/Streym. Ein tepur, men samanumtikið uppiborin sigur á uppflytarunum, sum komandi vikuskiftið ætla sær trý stig, tá VB/Sumba vitjar. Tað er neyðugt, um argjamenn ikki heilt skulu missa sambandið við liðini oman fyri seg á stigatalvuni.

Við eitt sindur av hepni og neyvleika hevði AB kunnað fingið meiri burtur úr, men sundalagsmenn fingu strítt seg til ársins fjórða útivallarsigur, so oddasessurin er framvegis teirra.

## – Ikki uppiborið

Málskjúttin hjá AB í gjár, Hendrik Rubeksen, er sannførdur um, at hansara lið átti at fingið meiri burtur úr dystinum móti oddaliðnum.

– Nei, eg haldi ikki at sigurin var uppiborin. Vit hava í hvussu so er møguleikar at skora eini tvey mál aftrat, men eru óskarpir, og tað kostar so hjá okkum. Eg vil eisini siga, at málini teir fáa eru bílig, har eingin dekkar upp. Móti endanum leggja vit teir eisini undir eitt øgiligt trýst, men aftur har vantar tað síðsta hjá okkum, sigur Hendrik Rubeksen.

Hann vísir á, at tað vísir seg at vera typiskt fyri lið í teirra støðu, at einki gongur teimum eftir vild.

– Tí liggja vit eisini har, sum vit liggja. Men vit hava fólki til nakað, sum er betur enn hetta, og úrslitini fara at koma, tað er eingin ivi um tað, slær Hendrik Rubeksen fast.

## – Áttu at avgjørt tíðliga

Bárður Olsen skeyt málið, sum í síðsta enda tryggjaði EB/Streymi trý stig í gjár. Hann heldur, at sigurin var uppiborin.

– Vit vóru væl betri allan fyrra hálvleik, og skuldu eisini havt avgjørt dystin, tá vit fáa brotsspark, vísir Bárður Olsen á. Hann heldur, at hóast teir komu undir trýst móti dystarenda, so vóru øll trý stigini fult uppiborin.

– Sigurin var eisini øgiliga týdningarmikil, tí bæði NSÍ og B36 vunnu sín dyst. HB tapti, so fjarstøðan niður til teir, er nú tann sama sum hon var, áðrenn vit spældu móti teimum, og tað er eisini gott, sigur Bárður Olsen.